## VIÐMERKINGAR

# Glasagerð

Spákaðu okkum ein túr oman á staðið, sum vit fyrr kendu sum Sandágerð, har aldurnar tutlaðu, fuglarnir lótu, men nú børnini gráta.

Tí fyri stuttum hevði »húðaskógvaungdómur« eitt tiltak, millum manna kent Free Føroyar. Eitt mentunnartiltak har fleiri av okkara fremstu tónleikarum luttóku.

Leivdirnar av hesum tiltaki sita nú á iljum barnanna.

Summa summarum: Hvar er virðingin fyri hesum landi, sum hesin ungdómur vil hava ræði á.

Kundi ein partur av inntøkuni av hesum tiltaki ikki verið nýttur til upprudding!!!!

Rúni Poulsen
Sjúrður Johansen
Hans Áki Chirstiansen
Bárður Mikkelsen
Regin Lamhauge
Jákup Sverri Kass
Jón Henriksen
Bjarni Wardum

# Fata morgana

**Eivind Jacobsen**
*Strendur*



Í havsbrúnni hómast eitt skip. Tað stóra tornið gerst alsamt stórri. At enda hvørvur Nólsoyggin aftanfyri skipið. Oljan er komin. Vit telja pengar. Vit leggja ætlanir. Hvat skulu vit gera við allar pengarnar?

Skipið fær boriloyvi og fer út á hav at LEITA eftir olju.

Eftir sita okkara ráðandi menn. Stórsta málið í dag er, næst eftir egnari løn, Búskapargrunnurin. Samgongan kann ikki semjast um, hvussu pengarnir í grunninum skulu brúkast. Stórsta partin av seinastu viku brúktu teir at verða ósamdir. Tað eru ivaleyst fleiri við mær, sum hava trupult við at skilja, hví vaksnir menn skulu verða ósamdir um hvør skal fáa útgjald úr einum tómum kassa.

Einki kann samla fólk, sum ein felags fíggindi. Men tá Nýrup er í summarferiu, noyðast teir at verða ósamdir við hvønn annan.

Havandi í huga, at tað einasta almannaráðharrin kundi bjóða í orðaskiftinum mánadagin var framhaldandi fígging til SJÁLVBOÐIÐ ARBEIÐIÐ, undrast vit enn meira, tá vit hugsa um, at enn veit eingin, hvat skal gjaldast inn í hendan grunn. Hevði tað ikki sømt seg betri hjá vaksnum monnum, at latið pengar komið í kassan, áðrenn tosa verður um, hvat pengarnir, sum ikki eru til og møguliga ongantíð verða tøkir, skulu brúkast til.

Men hetta er fólkafloks-politikkur, tá hann er bestur. Teir siga eitt í dag og annað í morgin. Støðufesti er í teirra hugaheimi ókent. Teir tosa, sum teir hava skil til. Tað er trupult at taka menn fyri fult, sum siga, at alt sum kemur í Búskapargrunnin skal deilast út til hvønn einstakan. Fyrr í ár søgdu somu menn, at pengarnir skuldu brúkast til at koyra í Landskassan, fyri at viga upp ímóti minkandi ríkisveiting.

Sum øll vita, kunnu pengar bert brúkast eina ferð. Tí lekur millum teori og praxis. Men hvat er at vænta, tá liberalu sjónarmiðini skulu berast fram av alment løntum persónum og teimum, sum bert tosa frá búkinum, og als ikki frá hjartanum.

Visiónir hjá livibreyðspolitikarum hava altíð og fara altíð at verða Fata Morgana

# Fyrispurningur til Høgna Hoydal!

**Bill Justinussen**
*Miðflokkurin*



Løgtingið samtykti í vár uppskot um sjálvstýri Føroya fólks. Hetta uppskotið innihelt tað, sum møguligt var at fáa hinar samgonguflokkarnar at taka undir við á sjálvsstýrisleið. Tú hevur í fjølmiðlunum víst á týdningin av hesi løgtingssamtykt, sum meirilutin av Føroya fólki eftir tíni meting stendur aftanfyri og tí eigur at takast í ramasta álvara. Hendan samtyktin verður eftir øllum at døma nýtt sum amboð at staðfesta okkara rætt sum tjóð.

Í sambandi við løgtingssamtyktir vil undirritaði loyva sær at seta hendan spurning: Í vár varð eisini ein onnur løgtingssamtykt gjørd. Hetta var løgtingssamtyktin um serskatting av hjúnum, sum ein meiriluti av Føroya løgtingi tók undir við. Ikki havi eg hoyrt nakran landsstýrismann klovið í tvey um, at hendan samtyktin skal virðast á sama støði sum hon um sjálvstýri Føroya fólks. Kann landsstýrismaðurin geva nakra trygd fyri, at partamaður hansara, fíggjarmálaráðharrin, vil taka nevndu løgtingssamtykt fyri fult og fyrireika neyðuga lógararbeiðið?

Til tey, sum annars lesa hetta, kann upplýsast, at ein løgtingssamtykt ikki kann sammetast við eina løgtingslóg, og at landsstýrið ikki er bundið av at fylgja løgtingssamtyktum. Tí haldi eg, at Høgni Hoydal yvirmetir týdningin av løgtingssamtyktini um sjálvsstýri Føroya fólk, samstundis sum eg haldi, at tey, sum vænta sær nakað sum helst burturúr uppskotinum um serskatting av hjúnum, verða hildin fyri gjøldur.

Almanna- og Heilsurøktarafelagið:

# Noktar limum at virka sum praktikvegleiðarar

**A.H.F. - Almanna- og Heilsurøktarafelagið (Føroya Sjúkrahjálparafelag) Fríbjørg Jacobsen, formaður**
*Tórshavn tann 06.08.01*

Við hesum verður boðað frá, at felag okkara hevur noktað øllum limum felagsins at virka sum praktikvegleiðarar fyri teimum heilsuhjálparnæmingum, sum eftir ætlan skuldu út í praktik 13.08.01.

Orsøkin til hetta stig er, at Fíggjarmálastýrið framhaldandi hevur noktað at sett inn í sáttmála okkara lønarskipan fyri teir assistentar, sum eru limir í felag okkara og sum starvast innan heimarøktina.

Hetta tykist at vera gjørt við fullum stuðli frá Almanna- og Heilsumálastýrinum.

Heldur ikki hava vit nakrar ásetingar fyri lønarsamsýning hjá limum okkara, sum eftir ætlan skuldu átaka sær at vera praktikvegleiðarar.

Í sambandi við at vit hava fingið skjalainnlit í Almanna- og Heilsumálastýrinum, hava vit tó staðfest, at tað tykist sum at Almanna- og Heilsumálastýrið ikki sakliga hevur viðgjørt hendan spurning um lønarásetingina hjá assistentunum.

Hinvegin tykist stýrið einvíst at røkja áhugamálunum hjá øðrum fakfelag, sum krevur ávísar treytir uppfyltar, fyri yvirhøvur at góðkenna, at limir okkara fáa løn samsvarandi sáttmála okkara.

Tað er átaluvert, at almennur myndugleiki soleiðis á ósakligan hátt viðger mál, sum hava við lønarviðurskiftini hjá limum okkara at gera, og enn meira óhugnaligt er hetta, tá hendan framferð helst kemur at hava ávirkan á røktina hjá teimum gomlu og veiku í samfelagi okkara.

Sum dømi um framferðina hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum kunnu vit vísa á, at vit fóru á fund við umboðum fyri Almanna- og Heilsumálastýrið, har annað fakfelag eisini var við.

Á hesum fundi reisti viðkomandi fakfelag ávísan spurning, sum als ikki var á dagsskránni, og hóast starvsfólk á Almanna- og Heilsumálastýrinum sum fundarskrivari ikki við einum orði í fundarfrásøgn síni hevur nevnt, at nøkur avtala ella semja varð gjørd um hendan spurning, so hevur Almanna- og Heilsumálastýrið seinni gjørt galdandi, at avtala varð gjørd á hesum fundi, um at sáttmáli okkara skuldi broytast eftir tí tilmæli, sum kom frá hinum fakfelagnum sum var við á fundi.

Tað er fyri okkum heilt óskiljandi, at almennur stovnur fyrst skrivar fundarfrásøgn frá fundi, og har ikki grettir orð um, at nøkur avtala er gjørd á fundinum, men síðani tykist at vilja tvinga felag okkara at viðurkenna, at vit hava gjørt avtalu um sáttmálaviðurskifti, hóast hin sáttmálapartur okkara, nevniliga fíggjarmálastýrið als ikki var við á hesum fundi.

Vit skulu tí við hesum boða frá, at Fíggjarmálastýrið og Almanna- og Heilsumálastýrið mugu taka fulla ábyrgd av tí støðu, sum nú hevur stungið seg upp, tí vit fara ikki at lata limir okkara átaka sær meiri arbeiði, enn tað sum álagt er teimum við setanini, so leingi sum sáttmálaviðurskiftini ikki eru komin í rætt lag.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg



**VW transporter**
**TDI 2500**
(kassabilur) við skaða til sølu, 3 1/2 ára gamal. Kann síggjast á Bilasøluni hjá Øssur Johannesen.
**Tlf. 212705 og 332705**



**REOLIR**
**Hædd 2-3 m**
*Hillar:*
*30 x 90 cm*
*45 x 90 cm*
*60 x 90 cm*
*75 x 90 cm*
*90 x 90 cm*
*Til tey størri goymslurúm bjóða vit stigar og bjálkar til europlattar*
**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

**Brúktbilalisti**

| Merki | Árg. |
|---|---|
| Ford Fiesta | 97 |
| Peugeot | 96 |
| Rover 420 RT | 97 |
| Nissan Primera | 90 |
| Fiat Punto 85 ELX 5h | 99 |
| Ford Fiesta | 96 |
| Daewoo Matiz | 99 |
| BMW 525iA | 97 |
| Opel Vectra Diesel | 98 |

**Sera lagalig fígging!**
**Bilfríðkan**
Velbastaðvegur • 110-Tórshavn
Tel. 31 73 00 - 21 73 00
www.bilfridkan.fo
FIAT
Sosialurin - 311820

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Yvirtænari søkist**
søkt verður eftir yvirtænara til Hotel Föroyar at byrja skjótast gjørligt.
***Umsókn við prógvum verður at senda til:***
Hotel Föroyar
Oyggjarvegur
Postboks 3303
FO-110 Tórshavn
***Innan 24. august 2001***
Hotel Föroyar
Tlf. 317500
Hotellið við útsýninum

**Bilur til sølu**
Toyota Carina st. car.
**P/F Fótbúni**
Tlf. 311705

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2772, Sp/f Sam, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 21.03.2001.
Nýggj adressa: Tinghúsvegur 8, Box 125, 110 Tórshavn
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Eyðun Hammer, á Teigi 4, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Beinta Eliasen, Fjalsgøta 50, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 6. august 2001

Kristin Balle

**Tórshavnar Ítróttarráð**
**Úrslit av drátti 6. august 2001**
Hesir seðlar hava vunnið:

| | | |
|---|---|---|
| Vinningur | nr. 1: | 4452 |
| Vinningur | nr. 2: | 1950 |
| Vinningur | nr. 3: | 13277 |
| Vinningur | nr. 4: | 2758 |
| Vinningur | nr. 5: | 3140 |
| Vinningur | nr. 6: | 16456 |
| Vinningur | nr. 7: | 21750 |
| Vinningur | nr. 8: | 8591 |
| Vinningur | nr. 9: | 8685 |
| Vinningur | nr. 10: | 5016 |

Ringið til Kristionnu, tlf. 319017, ella Birgir, tlf. 210298.

**Nýtt skeið**
**byrjar hóskvøldið 9. august kl. 19.00**



**Ole Lykke, tel. 220 972**
**Hugo Kristiansen, tel. 225 225**
**Johan Beder, tel. 210 821**
Sosialurin - 311820




